**Kvæðatilfar - Nr: 12**

# Lærarvegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 2. – 9. flokkur

**Uppgávuslag / heiti:** Rørsluvenjing og uttanatslæra

**Vegleiðing:**

Uppgávan er góð til uttanatslæru og rørslu samstundis.

Lærarin heingir ørindini runt í skúlagarðinum ella skúlagongini, sum næmingarnir hava fyri. Síðani teknar hann eitt kort á talvuna, sum vísir, hvar hvørt ørindi er.

Næmingarnir verða greipaðir tvey og tvey. Annar næmingurin tekur pappír og blýant og setur seg í skúlastovuni. Hin næmingurin rennur út, har 1. ørindi er. Næmingurin roynir at minnast so nógv sum møguligt og rennur síðani inn aftur í stovuna. Har sigur hon ørindi fyri sínum samstarvsfelaga, sum skrivar tað niður. Minnist hon ikki alt, má hon ein túr afturat. Tá alt ørindi er skrivað, skifta næmingarnir um: Tann, sum skrivaði, fer at renna, og tann, sum rann, setir seg at skriva. Soleiðis halda tey á, til øll ørindini eru niðurskrivaði, sum lærarin hevur givið teimum fyri.

**Onnur hugskot:**

Ein fimleikarhøll kann eisini nýtast til endamálið. Tá kann lærarin seta aðrar treytir sum t.d. at grulva til og frá fyrsta ørindi, lakka til og frá næsta ørindi, rulla, bólta rút og o.s.fr.